## Útvísingin fær eftirspæl

Alex Jose dos Santos hjá EB/Streymi var ógvuliga ófantaligur í sínum atburði, tá hann varð vístur av vøllinum í dystinum móti ÍF í Fuglafirði leygardagin. Tá Eiler Rasmussen gav honum seinna gula kortið, bæði rópti Alex Jose dos Santos og sló út við armunum. Harumframt skumpaði hann undir Eiler Rasmussen við bringuni, og var ófantaligur móti liðleiðara sínum, tá hesin royndi at toga hann av vøllinum. Eiler Rasmussen sigur við Sosialin, at hann hevur skrivað eina frágreiðing um atburðin hjá Alex Jose dos Santos, sum er latin Fótbóltssambandinum til viðgerar.



## Høgni Zachariassen á landsliðið

Fuglfirðingurin er úttikin fyri Andreas Lava Olsen hjá Víkingi, sum hevur givið avboð vegna vøddaskaða. Høgni Zachariassen hjá ÍF hevur ongantíð áður spælt á landsliðnum, so kemur hann á vøllin í móti Fraklandi, verður hetta hansara fyrsti landsdystur. Høgni Zachariassen er ikki tann einasti, sum stendur til at fáa debut mikukvøldið, tí tað sama er galdandi fyri Jóan Símun Edmundsson hjá B68.



Poul Ennigarð spældi bara fyrra hálvleik fyri ÍF, tí beint fyri steðgin varð hann vístur av vøllinum
Mynd: Sofus D. Johannesen

### ÍF – EB/Streymur 3- (2-0)

# Meistararnar eyðmýktir í Fuglafirði

ÍF

EB/Streymur

**Við kvikum kantum, einum øgiligum áleypara og einum liðavriki av teimum heilt góðu, eydnaðist tað fuglfirðingum at spæla meistararnar út av vøllinum. Eisini hóast teir vóru ein maður færri í meiri enn trý korter**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

ÍF hevur ikki breiðasta hópin í landinum. Men tá allir mans eru tøkir, er talan um sterkt lið í hevur fleiri streingir at spæla uppá.

Leygardagin vóru tveir mans úti við skaða. Hanus Eliasen og Aleksandar Jovevic. Annars vóru allir mans tøkir. Eisini Rógvi Jacobsen. Við tveimum málum setti hann sín dám á dystin.

Tað sama gjørdi ungi Dánjal á Lakjuni. Maðurin við talinum 14 á bakinum voldi ferð eftir ferð EB/Streymi trupulleikar við sínum øgiliga skjótleika, og tað sama gjørdi Andy Olsen í hinum borðinum.

Í verjupartinum royndust Bartal Eliasen og ikki minst Høgni Zachariassen væl.

### Tvey reyð kort

Eisini miðvøllurin var stinnur eftir at Poul Ennigarð varð vístur av vøllinum. Seinna gula kort hansara var ógvusligt, men óheppið, tí neyvan hevði gøtumaðurin ætlað tað so meint, sum tað gjørdist, tá hann kom ov seint við taklingini á Pætur Dam Jacobsen.

Hóast tað var tíðliga í dystinum, kom útvísingin ikki óvæntað.

Fuglfirðingar høvdu tá spælt rímiliga harðligt eina løtu, og Poul Ennigarð hevði sjálvur staðið fyri fleiri fríspørkum.

Útvísingin av Poul Ennigarð var ikki tann einasta, tí stutt fyri leiklok kókaði yvir hjá Alex Jose dos Santos. Eitt ógvusligt fríspark var framt í móti honum. Hesin ÍF'arin átti at fingið gult kort, men Eiler Rasmussen, sum ikki hevði sín allar besta dag, valdi ikki at geva kort fyri hetta.

Hetta fekk sinnið í kók hjá brasiliumanninum, og Eiler Rasmussen fekk eisini at vita, hvat Alex Jose dos Santos helt um hetta. Tískil var hann revsaður fyri sítt ófantaliga orðaval og atburð.

Vinstri vongverjin hjá EB/Streymi gavst tó ikki so, men helt áfram og Eiler Rasmussen hevði ikki annað val, enn at vísa mannin av vøllinum.

Ein beinleiðis tápilig útvísing fyri tápiligan atburð.

### Effektivir fuglfirðingar

Útvísingin var ein staðfesting av, at einki riggar hjá EB/Streymi í løtuni. Kjansirnir, teir høvdu, vóru ikki nógvir, men tá vandi var á ferð, var heldur talan um stong út enn stong inn.

Hjá ÍF lá hinvegin væl fyri. Øgiliga effektivir vóru teir. Fyrsti veruligi kjansir teirra var bara hálvur, men Frank Poulsen høgdi til úti frá eftir uppspæl í vinstru, og bólturin sang í meskunum. Hetta var, tá 20 minuttir vóru spældir og fýra minuttir seinni var aftur galið.

Hornaspark varð sent móti fremru stong, har Rógvi Jacobsen stútaði og so var 2-0.

Triðja málið stóð Rógvi Jacobsen eisini fyri, tá hann við einum fínum fluktara staðfesti sigurin. Hetta var stutt inn í seinna hálvleik, og hóast yvirtal var einki at gera hjá EB/ Streymi.

Og teir gjørdu heldur ikki tað stóra. Eingin vilji og einki hugflog. Púra óinpireráð! Liðið hevur nú tapt tveir dystir á rað. Báðar ferðir eru trý mál farin í gjøgnum.

Arnbjørn Hansen pyntaði um úrslitið móti dystarenda í Fuglafirði, so samlaða málúrtøkan hjá EB/ Streymi teir báðar seinastu dystirnar er 1-6.

## Útvísing gav 10 prosent eyka

Rógvi Jacobsen segði eftir dystin í móti EB/Streymi, at útvísingin av Poul Ennigarð fekk ÍF at kýta seg tíggju prosent aftrat.

– Tað søgdu vit við hvønn annan í steðginum. At 3-0 málið kom so tíðliga hjálpti eisini okkum væl, ásannaði Rógvi Jacobsen. Tískil helt hann seg eisini kunnað siga, at teir vóru einki aftanfyri EB/Streym, hóast teir spældu við tíggju monnum í ein heilan hálvleik.

Sigurin og stigini koma annars væl við hjá ÍF.

– Botnliðini hava ligið og andað okkum i nakkan, og tá er vandin stórur fyri, at vit enda longur niðri á stigatalvuni. Júst tí var ein sigur sum hesin, ið hálar okkum longur upp á stigatalvuni, ógvuliga umráðandi, segði Rógvi Jacobsen eftir dystin.

## EB/Streymur var ongantíð á lívi

Hans Pauli Samuelsen var ógvuliga fáorðaður, men kortini beinrakin, tá Rás2 tosaði við hann eftir dystin í gjár. Spurdur, um tað var málið til 3-0, sum tók lívið av teimum, svaraði víkamaðurin, at hann helt ikki, at EB/Streymur nakrantíð var á lívi leygardagin.

– Har var eingin futtur í monnunum og eingin geistur, so hetta var als ikki nóg gott, segði hann.

Hans Pauli Samuelsen vísti á, at ÍF stóð ógvuliga væl á vøllinum og at EB/Streymur einki pláss fekk. Hans Pauli Samuelsen segði somuleiðis, at EB/Streymur nú má arbeiða við bæði verjupartinum og álopspartinum og sipaði hann til, at liðið hevur tapti tilsamans 6-1 í móti AB og ÍF.